# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Rakettavtalan millum USA og Kekkia kann noyða okkum at svara við vápnamegi heldur enn orðum*

*russiska uttanríkisráðið*

# Russar royna at ræða Evropa

**USA leggur Russland undir at hótta evropeisk lond við hernaðarálopum fyri at ræða tey frá at samstarva við amerikanararnar**

Russland hótti í gjár við at brúka hermegi, um Kekkia ger álvara av ætlanini at hýsa pørtum av amerikonsku rakettverjuætlanini, soleiðis sum uttanríkisráðharrarnir í USA og Kekkia samdust um í gjár. Amerikanska stjórnin heldur, at russiska hóttanin er ætlað at ræða tey eysturevropeisku londini ímóti at knýta seg ov tætt at USA hernaðarliga.

- Mín hugsan er, at russar royna at ræða evropear frá at taka lut í verjuætlanini, men hóttanir sum hesar fara ikki at broyta nakað, sigurt Geoff Morell í amerikanska verjumálaráðnum við CNN. Hvítu Húsini vóru eisini skjópt at gera viðmerkingar til hóttanina hjá uttanríkisráðnum í Moskva.

- Vit royna at fáa samstarv við lond, so vit kunnu forða rakettálopum úr yvirgangslondum sum Iran, og vit fara framvegis at tosa við Russland um ætlanina. Russland og Evropa kunnu gerast partur av ætlanini á jøvnum føti, sigur talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Gordon Johndroe, við AP.




*Kekkar mótmæla, at USA sleppur at seta verjurakettir upp í Kekkia*

*Mynd: Polfoto*

### Svara við hermegi

Russiski forsætisráðharrin, Vladimir Putin, hevur fleiri ferðir ávarað um, at Russland fer ikki at sita hendur í favn, um amerikanarar gera álvara av at seta rakettverju upp í Eysturevropa. Ávaringin, sum kom úr russiska uttanríkisráðnum, í gjár, var greið:

- Tað kann henda, at vit verða noydd at svara við hermegi heldur enn orðum, stóð í ávaringini úr Moskva.

USA vil eisini hava eina avtalu við Pólland, men londini eru ikki samd um innihaldið í avtaluni. Haraftrat vísir ein meiningakanning, at bara 28 prosent av polska fólkinum tekur undir við at hýsa pørtum av amerikonsku rakettverjuni.

# Ísurin bráðnar undan granskarunum við Norðpólin

**Í gjárkvøldið máttu granskararnir fara av av einari russiskari granskingarstøð við Norðpólin, tí ísurin bráðnar undan teimum**

Ísurin kring Norðpólin bráðnar skjótari, enn vísindafólk høvdu roknað við, og í gjár noyddust vísindafólkini á einari russiskari granskingarstøð at biðja um hjálp, tí ísurin var farin at bráðna undan teimum. Í gjárkvøldið var ísbrótarin Mikhail Somov og tók vísindafólkini av ísinum. Hann er nú á veg til Murmansk við teimum.

Vladimir Strugatskij, sum er varastjóri í russiska pólfelagnum, sigur við norska kringvarpið, at granskingarstøðin hevur hildið til á einum stórum ísflaka síðani í septembur í fjør. Tá var ísflakin 15 ferkilometrar stórur, men í dag er hann bara 300 ferðir 600 metrar.

- Hann bráðnar skjótt, og tí var ikki annað at velja í enn at taka granskararnar av ísinum, sigur Vladimir Strugatskij við NRK.



## STUTT SAGT

### Samd um rakettskipan

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, hevur verið í Prag og skrivað undir eina avtalu millum Kekkia og USA um, at amerikanarar skulu fáa loyvi at seta ein part av teirri nógv umrøddu rakettverjuskipanini upp í Kekkia. Meiningakanningar vísa, at nógv tann størsti parturin av kekkiska fólkinum eru ímóti avtaluni við USA. Í teirri seinastu kanningini svaraðu heili 68 prosent, at tey vóru ímóti, at Kekkia skal hava nakran lut í amerikonsku ætlanini. Bara 24 prosent søgdu ja. Russland hevur ávarað Kekkia ímóti at hýsa amerikanskari hernaðarútgerð, og fólk, sum eru ímóti avtaluni, gingu í gjár í gøtunum í Prag við skeltum, har tað stóð, at Kekkia vil ikki vera álopsmál hjá russum.

### 3.315 koyrdu ov skjótt



Eitt átak hjá donsku løgregluni seinasta vikuskiftið avdúkaði, at nógvir danskir bilførarar koyra ov skjótt. Tilsamans 3.315 bilar vórðu steðgaðir, tí teir koyrdu skjótari, enn teir høvdu loyvi til. Tølini hjá løgregluni vísa, at bilførarar á Sælandi og Lollandi/Falster hava serliga ilt við at halda seg niðan fyri hámarksferðina. Í hvussu er vórðu 1.492 bilførarar í hesum landspørtunum skrivaðir upp fyri at koyra ov skjótt. Í Jyllandi og á Fyn var frægari, men tað vóru serliga bilførararnir á Bornholm, sum skikkaðu sær væl í ferðsluni. Har komu bara sjey bilførarar í svørtubók, sigur TV2.